# Eg meini tað



Óla Jákup Rólantsson,
útvarpsmaður

# Ikki pláss fyri tignini!

Tign merkir sómi, tignarlæti, virðileiki og manslæti. "Værdighed" á donskum. Á donskum tosa tey um at "holde værdigheden" – tað verður sambært orðabókini týtt til "at taka seg væl út", at "vilja hava, at fólk hava virðing fyri sær"! Tign kann eisini merkja "høgt starv", "høg støða", ella "mæti, tad at vera millum tey fremstu í samfelagnum", ella "at hava hægstu støðu í samfelagnum!"

Fara vit nakrar mánaðir aftur í tíðina, so varð nógv tosað um Løgtingsins tign! Vit skuldu hava nytt løgtingshús, tí pláss ikki var fyri allari tignini í tí gamla! Og sambært tingformanninum var so avgjørt ikki pláss fyri fullveldinum í gamla og vakra – haldi eg - tinghúsinum. Vit skuldu hava nýtt glashús, har góð rúmd var fyri at útstilla tignina fyri altjóða samfelagnum, vit nú skuldu teljast sum sjálvstøðug eind av. Men glashúsið var ein treyt fyri tignini.

Hvussu hevur so gingist vid tignini síðan? Hyggja vit at atburðinum hjá teimum fólkavaldu, so rýma teir úr tinginum – av arbeiðsplássinum – tá teir eru ósamdir, hóast settir í starv til júst at samskifta! Og nú ganga teir so fullir eisini! Í arbeidstíð eisini, skilst.

Tjódveldisflokkurin tók hetta til eftirtektar beinanvegin – og tók sær kanska av góðum grundum eisini ábreiðslurnar nær. Og tað skulu vit hava alla virðing fyri, at flokkurin alment viðurkennir, at trupulleikin er millum politikkarar – at spurningurin er tikin upp í flokkinum, og avgjørt er, hvussu trupuleikarnir skulu handfarast – og at neyðug stig eru longu tikin av persónum, sum sjálvir meta seg hava trupulleikarnar.

Tað er eitt stórt stig at taka – ein stórur kamelur at svølgja, sum politikararnir plaga at taka til – og tað er eisini at hava stórstu virðing fyri, at flokkurin alment kunngerð ein internan rúsdrekkapolitikk, har bæði viðgerðin og avleiðingin annars verður staðfest. Viðgerðin er, at flokkurin stuðlar teimum, sum hava trupulleikarnar til at leita sær professionella hjálp og ráðgeving, og avleiðingin er – um trupulleikin ikki verður loystur – at tað fær avleiðingar fyri politiska ábyrgdarstarvið! Hetta seinasta er sjálvsagt serliga avgerandi fyri tignina í framtíðini.

Hesum eiga allir flokkar á tingi eiga at taka undir vid, hóast Javnaðarflokkurin kendist nakað lunkaður í síni vidmerking, meðan hinir søgdu seg ikki kenna trupulleikan innanflokka. Men so er eftir hjá okkum at síggja, at hesi, ið vilja vera so tignarlig, læra nakað av hesum.

Í hesum føri má tað fyrsta verða, at tað verður viðurkent, at tad ikki ber til at skjóta seg undir – sum tað stendur í kunningini frá Tjóðveldisflokkinum ovast, at "hesin spurningur er ikki nýggjur, men hevur altíð verið kendur í føroyskum politikki – í helst øllum flokkum!" Ein flokkur verður jú ikki betur av at hinir eru líka ringir. Og at fleiri tingmenn og landsstyrismenn gjøgnum tíðina hava drukkið seg í hel, er jú eingin umbering fyri at menn í dag gera tad sama!

Skal ein hava makt, so skal ein eisini hava akt. Ein má gera seg verdugan til tign! Tað tydningarmesta fyri okkum, sum skulu gjalda fyri hetta sirkusið, er tí, at hesir somu gevast við at tosa um kostnaðarmiklar tignarligar karmar um teirra virksemi. Tí sum er hevur hetta virksemið ikki uppiborið nakrar tignarligar karmar yvirhøvur.

**TÓNLEIKUR.** Steffen Brandt hevur meiningar um tað mesta. Hann er komponistur, yrkjari og headmaður í einum av best umtóktu donsku poppbólkunum seinastu 20 árini, TV2.



**Steffen Brandt og TV2 hava konsert í Føroyum um eina viku**

# Til fyrilestur hjá Steffen Brandt

*Eyðun Klakstein*

Hann er herviligur at brúka ironi og sarkasmu, hann fírir ikki fyri at siga sína hugsan um dagsins samfelag, sum hann eina ferð proklameraði hevði skuldina, og hann fær endaleyst pláss í fjølmiðlunum, tá hann kemur við nýggari plátu.

45 ára gamli Steffen Brandt er talsmaður fyri TV2 – keðiligasta bólk í Danmark, sum teir plagdu at kalla seg – og um eina viku fer hann aftur á pallin í Føroyum, tá TV2 fer at spæla til konsert í Havn.

Og so er ikki gott at vita, um hann fer at gera, sum tá hann á sinni fór á pallin frammanfyri 40.000 ovfarakátum keypmannahavnarum og legði fyri við at siga: »Gott kvøld, Odense...«

Síðani TV2 kom út við síni fyrstu plátu í 1981, Fantastiske Toyota varð hon doypt, hevur bólkurin vunnið seg fram til at verða nakað tí best umtókta og best seljandi í donskum popptónleiki.

Teir verða kallaðir besti livebólkur í danska kongaríkinum, og nú vit standa á gáttini til eina nýggja tíð í sambandinum millum Føroyar og Danmarkar, skal enn ein bólkur av tónatindinum í Danmarkar undirhalda føroyskum áhoyrarum.

**Rættir menn...**
Byrjanin hjá TV2 var nakað trilvandi. Teir góvu tvær plátu út í byrjanini av 80'unum, áðrenn teir fingu rættiliga undirtøku millum tónleikakeyparar. Plátan *Beat,* sum kom í 1983, seldi 50.000 eintøk og konsertferðin, sum kom í hølunum á hesi útgávu, varð útseld allastaðni.

Næstu útgávurnar staðfestu støðuna hjá TV2, og plátusølan bara vaks. Næsta plátan seldi tvífalt so nógv sum *Beat*, og við *Rigtige mænd gider ikke høre mere vrøvl* fekk TV2-konseptið rættiliga vind í seglini.

Vendingar og orð frá yrkingunum hjá Steffen Brandt sníktu seg upp í gerandismálið og í yvirskriftirnar í bløðunum, og hesin raffineraði og tungusnildi poeturin úr Århus fór at seta dagsordanin fyri danskan popptónleik.

Útgávan um tað, sum Steffen Brandt nevndi rættar menn, seldi heili 250.000 eintøk, men orðaskiftið í kjalarvørrrinum á hansara yrkingum var stundum hvast, tí øll høvdu ikki sama ans fyri ironi, sum Steffen Brandt hevði.

Og sjálvur plagar Steffen Brandt at fortelja søguna um seg sjálvan, tá hann, stutt eftir at plátan um rættar menn var útkomin, fór trillandi við einum barnavogni í illveðri í Århus. Meðan hann stríddi seg ígjøgnum regn og vind, steðgaði ein stórur treylari við síðuna av honum, førarin skrúvaði rútin niður og rópti á hann: »Rættir menn... ha!!!«

**Fyrilesturin**
Í 1988 kom útgávan *Nærmest lykkelig,* sum av mongum verður mett at verða besta TV2-útgávan, men so seint sum í 1994 gjørdi TV2 eina stóraseljandi fløgu afturat.. Hon kallaðist *Verdens lykkeligeste mand*, og sangurin um *Samfundets skyld* gjørdist eisini eitt lítið hitt í Føroyum.

Sigrarnir hjá TV2 og yrkingunum hjá Steffen Brandt eru óteljandi. Heiðurslønirnar hava verið mangar, og í 1997 var yrkingin til sangin *Kom lad os brokke os* brúkt til próvtøkuna í donskum í 10. flokki.

Steffen Brandt syngur ikki eins sannførandi, sum hann yrkir og smíðar løg, men hann er sangarin í TV2, og tey, sum ikki kenna TV2 undan konsertini næsta fríggjadag, kunnu kanska illgita konsertina fyri at verða ein fyrilestur hjá Steffen Brandt, men tá hann hálvtosar og hálvsyngur saman við tónleikinum hjá restini av manningini í TV2, finst ikki betur popptónleikur á donskum.

Rættir menn leggja ikki í at hoyra meira møsn...

2'arin **Tíðindablaðið Sosialurin**. **Postadressa:** Postboks 76, 110 Tórshavn. **Telefon:** 311820. **Telefax:** 314720.
**Email til 2'aran:** eydun@sosialurin.fo. **Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller. **Blaðstjórn:** Eyðun Klakstein.
**Layout og uppseting:** Tíðindablaðið Sosialurin.



# Seks í eini pyjamas

**SJÓNLEIKUR.** Ein øðilig fløkja skal greiðast, misskiljingarnar eru nógvar og ferðin høg, tá seks klaksvíkingar fara í eina pyjamas. Um eina viku verður nýggjur leikur hjá sjónleikarfelagnum í Klaksvík frumsýndur



**Nýggi leikurin hjá klaksvíkingum hevur nógva ferð og er hendingaríkur**

*Eyðun Klakstein*
*Myndir: Símun á Høvdanum*

Hvussu tað sær út, tá seks klaksvíkingar eru í einum pyjamasi er ilt at ímynda sær, men stuttligt verður tað í øllum førðum, tá Klaksvíkar Sjónleikarfelag fer at spæla franska skemtileikin *Seks í eini pyjamas*.

Seks leikarar hava saman við leikstjóranum vant leikin í næstan tveir mánaðir, og tá frumsýningin verður næsta leygardag, lovar leikstjórin ein sera skemtiligan leik, har tað er ferð á og fløkjurnar nógvar, áðrenn alt endar, sum tað skal enda.

Egi Dam hevur sett leikin upp, og honum dámar væl leikin.

– Hetta er ein góð farsa, sum hevur allar tær fløkjurnar, sum ein slík skal hava. Og so hevur hon eisini ein góðan enda. Leikurin er væl skrúvaður saman, hann er vælskrivaður, og umsetingin er eisini sera væleyndað. Málið er gott og lætt, og tað hevur gjørt tað gjørligt hjá okkum at fáa ein livandi leik burtur úr, sigur Egi Dam.

Hann hevur áður sett leikir upp í Klaksvík, og hann sigur seg hava havt stóra fragd av hesi uppgávuni.

**Hendaríkur leikur**
Tað hevur tikið drúgva tíð at fáa leikin at sita, men nú ein vika er til frumsýningina, heldur leikstjórin støðuna verða undir kontroll.

– Leikararnir skulu duga tekstin uttanat, og eg havi roynt at leggja til rættis, hvussu leikararnir skulu flyta seg á pallinum og so víðari. Tað er alt komið uppá pláss nú, og tann seinasta vikan skal brúkast til at fáa ferðina á leikinum upp og fáa tað at svinga, sigur Egi Dam.

– Tað hendir nógv í leikinum, og tí hava vit arbeitt nógv við at fáa timingina upp á pláss. Men eg havi havt góðar leikarar at arbeiða við , og flestu teirra hava nógvar royndir á palli, og tað hevur gjørt uppgávuna munandi lættari.

Leikararnar eru Adelborg Linklett, Jan Gardar, Hans Hjalti Skaale, Súsanna Jacobsen, Jógvan Jacobsen og Jórun Ljósstein.

– Tað er ein stórur fyrimunur fyri meg sum leikstjóra, at eg havi leikarar, sum leggja so nógv í tað, sum hesir hava gjørt tað. Hetta eru jú fólk, sum hava arbeiði um dagin og venja sjónleik um kvøldi, og tá skal ein góður hugur til, sigur Egi Dam.

**Lítið av tøkni**
Leikurin krevur lítið at tøkni. Tað eru nakrar fáar ljóðeffektir, og ljósið skal mest sum bara tendrast.

– Tað gevur mær betri stundir at arbeiða við leikinum og leikarunum. Eg eri jú einsamallur um teir, og teir skulu ikki hugsa um annað enn at spæla leikin, sigur Egi Dam.

*Seks í eini pyjamas* snýr seg um Jaqueline og Bernhard, sum eru væl fyri fíggjarliga og hava alt tað, tey kunnu ynskja sær – eisini elskarar.

Tá Jaqueline ætlar sær at vitja mammu sína, fegnast Bernhard um, at hann fær eitt vikuskifti fyri seg sjálvan. Hann sendir boð eftir frillu síni og vinmanninum Robert.

Men Robert er ikki bara vinmaður hjá Bernhard, hann er eisini væl við Jaqueline, og tá hon frættiar, at Robert kemur at vitja, avlýsir hon ferðina hjá sær.

– Sum gongdin í arbeiðnum við leikinum hevur verið higartil, kann eg lova ein góðan skemtileik á høgum støði, sigur leikstjórin.

*Sjey í eini pyjamas* verður frumsýndur í Atlantis næsta leygardag.



**Leikarar og leikstjóri. Frá vinstru: Súsanna Jacobsen, Hans Hjalti Skaale, Adelborg Linklett, Egi Dam, Jógvan Jacobsen, Jan Gardar og Jórun Ljósstein**



**Jógvan Jacobsen og Hans Hjalti Skaale**